## Nýggj í nevndini

Aðalfundur var í Róðrarsambandinum leygardagin, og har kom ein nýggjur limur í nevndina. Tað var Súnhild Holm, sum var vald fyri Árna Andreasen, sum ikki stillaði uppaftur. Jan Herman Hansen og Paula Eikhólm blivu bæði afturvald uttan mótvalevni. Hinir nevndarlimirnir eru Poul John Æðustein og Jakku Guttesen, og tiltakslimir eru Mayfinn Norðoy og Høgni Midjord.



## FM í barnaróðri

Trígiggjar av kappróðrarstevnunum í summar verða eisini FM-stevnur fyri børn. Ein trímannabólkur skal gera reglugerð fyri róðurin og aldursbólkar, umframt uppskot til, hvørjar stevnur, talan skal verða um. Fyri Norðoyastevnu verður so hildin eykaaðalfundur, sum skal taka endaliga støðu. Hóast tríggjar stevnur nú verða FM-stevnur, verður barnaróður sum vanligt á hinum fýra stevnunum.

### Kyndil-VÍF 29-30 (12-15):

# Sjálvmál sendi VÍF í finaluna

**Marginalarnir spældu við VÍF, tá teir fingu avgerandi málið í gávu frá óhepna Kyndils-málverjanum**



jakup@sosialurin.fo
Jákup Mørk

Enn er finaluplássið hjá VÍF ikki bókað, men tað er nær við. Fjórði sigurin av fýra møguligum við Haraldi Bjørgvin sum venjara kom til høldar sunnudagin, og nú er VÍF trý stig undan hinum fýra liðunum. Bara tveir dystir eru eftir, og tí er ein sigur í øðrum av hesum nóg mikið hjá vestmenningum, um teir aftur í ár skulu verða partur av FM-finaluni.

Seinnu umførini hevur VÍF eisini spælt sum ein komandi FM-biðil, og tað var ikki líkt til, at teir skuldu fáa teir heilt stóru trupulleikarnar av Kyndli.

Uppgerðirnar millum liðini hava mangan verið bæði harðar og intensar, men fyrstu 40 minuttirnar sást mest sum einki av hesum. Dómararnir hildu spælarunum í stuttum tjóðri, soleiðis at spælið ongan tíð gjørdist harðligt, og leikliga var VÍF somikið greitt við yvirlutan, at spenningur at kalla ikki var í dystinum.

### Ov seinført spæl

Hjá Kyndli gekk spælið hinvegin alt ov seint fyri seg, og tí munaði tað so lítið, at Magnus Matras hevði ein av sínum góðu døgum í málinum.

Í málum var munurin kanska ikki so ovurstórur, men vestmenningarnir komu munandi lættari til síni, og tá teir stutt eftir steðgin øktu munin til seks mál, mundu tey flestu halda, at nú var leyst og liðugt.

Í eini roynd at venda dystinum, valdi Kyndil at verja 4-2, soleiðis at Áki Olsen og Sámal Joensen vórðu mest sum tiknir úr spælinum. Og tað gav eisini at bíta hjá VÍF, sum nú av álvara kom í trupulleikar.



VÍF vann í gjár sín fjórða sigur av fýra møguligum við Haraldi Bjørgvin sum venjara og er nú bara eitt stig frá finaluni
Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

Eli Müller spældi tó ein branddyst í málinum, og hetta saman við nøkrum ordans høggum frá Magnusi Müller, tá mest stóð á, syrgdi fyri, at Kyndil ongan tíð kom framum, hóast trýstið var stórt. Tvær ferðir komu teir upp á javnleikin, men tað eydnaðist teimum ongan tíð at toga seg avgerandi málið framum.

### Ógloymandi endi

Og so gjørdist talan um ein enda, sum tey fægstu munnu gloyma í bræði.

Kyndil hevði javnað til 29-29, tá Áki G. Olsen royndi seg við undirhondsskoti. Bólturin tók fyrst og vinstra og síðani í høgra stólpa, áðrenn hann rakti bakið á Erlendi Johannesen í Kyndils-málinum. Bólturin lá at kalla stillur, men tað visti málverjin ikki av, og tá hann skundaði sær at snara sær á, kom hann at skumpa bóltin í meskarnar. Ein mest sum syrgiligur endi á dystinum fyri Erlend, sum annars hevði mest sum lukkað málið av seinasta korterið.

Áki G. Olsen fekk løtu seinni møguleikan at køva allan spenning, tá hann fangaði bóltin, meðan Kyndil hevði skapt yvirtal við at skifta útispælara inn fyri málverjan. Men av miðum vølli tveitti hann bóltin við síðuna av málinum, og so fekk Kyndil enn ein møguleika, sum tó endaði við einum seinasta og úrslitaleysum tríggjametra-kasti.

### Finaluklárir

Sigurin ber við sær, at VÍF nú er trý stig undan restini í kapprenningini um pláss í FM-finaluni, har Neistin er mótstøðuliðið.

Og tað er øll orsøk at rokna við, at VÍF staðfestir hetta plássið, tá teir næstu ferð eiga heimadyst móti KÍF. Síðani venjaraskiftið hava vestmenningarnir verið at kalla flúgvandi, og skal nakar skala annars suverena Neistaliðnum, so er VÍF í løtuni so nógv tað besta boðið.

Kyndil, KÍF, H71 og StÍF gerast mest sannlíkt ov stutt í hesi kapprenningini, men tað man vera ein lætti fyri hesi, at niðurflytingarspurningurin nú neyvan verður aktuellur.

## Ræðulig sekund

Áki G. Olsen hevði ráð at hava tað stóra smílið á andlitinum, tá dysturin móti Kyndli var av, men hann viðgekk uttan at blunka, at seinastu sekundini vóru alt annað enn stuttlig.

– Eg hevði tað ræðuligt. Eg hevði jú eitt tómt mál at skjóta í, men ístaðin fyri at skora og lukka dystin, rakti eg við síðuna av. Og so fær Kyndil ein hampuliga góðan møguleika, sum teir tíbetur ikki skora uppá, sigur Áki G. Olsen.

Um dystin sjálvan helt hann, at tað var vantandi neyvleiki, sum mundi kostað VÍF heilt nógv.

– Vit hava fult tamarhald á tí mesta, og eg haldi, at munurin gjørdist eini seks mál. Men so byrja vit at brenna ov nógv, og so verður tað heilt spennandi her móti endanum.

Og tit eru nú heilt nær finaluni. Er tað hana, sum tit nú hugsa um?

– Als ikki. Tað eru bara fýra umfør síðani, at vit vóru niðasta liðið í deildini. Nú hava vit so vunnið fýra dystir á rað, og vit hugsa eina og aleina um tann dystin, sum nú stendur fyri framman.

-mørk

## FAKTA

**Kyndil-VÍF 29-30 (12-15)**
**10 min:** 4-6
**20 min:** 9-10
**40 min:** 18-22
**50 min:** 23-24
**Málskjúttar**
**Kyndil:** Josef Abrahamsen 8(2), Bárður Johannesen 5, Hans Áki Dal-Christiansen 5(2), Janus Einar Sørensen 3, Høgni Klein 3, Tummas Pauli Hanusarson 3, Ken Zachariassen 1
**VÍF:** Sámal Joensen 12(5), Agnar Joensen 5, Bjarti Joensen 5, Magnus Müller 3, Áki G. Olsen 2, Áki Olsen 1, Joen Pauli Høgnesen 1, Sjúrður Poulsen 1
**Brotskøst:** Kyndil 6, VÍF 5
**Útvísingar:** Kyndil 6, VÍF 6
**Dómarar:** Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen